## HVUSSU FÁI EG EINA

# BURÐARDYGDS GÓÐKENNING?



Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

# ENDAMÁL

Krøvini um at samskifta greitt og álítandi um burðardygd økist. Fyritøkur og felagsskapir verða í vaksandi mun biðin um at vísa fram sítt arbeiði og sínar ætlanir við burðardygd.
Hetta setir krøv – og skapar samstundis óvissu. Fokus á *greenwashing* ger, at fleiri halda seg aftur við at fortelja um sítt burðardygdararbeiði. Hetta verður nevnt *greenhushing* – at tiga, hóast gott arbeiði verður gjørt. Úrslitið er, at vit missa vitan, íblástur og møguleikan fyri felags menning.
Ein burðardygdargóðkenning er eitt sterkt amboð – bæði til at lofta vaksandi krøvum og til at menna og vísa fram tykkara burðardygdsarbeiði á ein álítandi hátt. Hon gevur tykkum eina greiða kós og karmar at arbeiða eftir – og hjálpir tykkum at savna, skjalprógva og miðla tykkara arbeiði.
Tað snýr seg eisini um at hugsa burðardygd á nýggjan hátt. Ein góðkenning gevur tykkum møguleika at síggja virkisøkið við nýggjum eygum – og finna loysnir, sum bæði kunnu spara orku, betra tænastur og økja trivnaðin. Tað kann loysa upp fyri íblástri, sparingum, nýhugsan og menning – bæði hjá leiðslu og starvsfólki.

# HVAT ER EIN BURÐARDYGDS GÓÐKENNING?

Ein burðardygds góðkenning er ein óheft meting, sum váttar, at tit lúka ein góðkendan standard fyri burðardygga ferðavinnu.
Tað eru trý stig:

- 1. stigs (First-party): Tit gera eina innanhýsis meting. Gott byrjanarstøði.
- 2. stigs (Second-party): Ein ráðgevi ella kundi, sum tit samstarva við, metir tykkara arbeiði.
- 3. stigs (Third-party): Ein óheftur og góðkendur stovnur metir tykkum. Hetta er mest álítandi og altjóða viðurkenda skipanin. Vit viðmæla hesa góðkenning, tí hon gevur tykkum trúvirði og styrkir álitið hjá kundum og samstarvsfeløgum.

# HVÍ FARA Í GONGD?

Ein góðkenning er prógv um, at tit arbeiða við burðardygd á skipaðum og álítandi grundarlagi.
Her eru tríggjar høvdusorsøkir at fara í gongd:

1. **Álit og prógv**: Ein góðkenning váttar, at tykkara arbeiði lýkur altjóða krøv, t.d. innan stýring av innkeypi og veitingum, lógarábyrgd og váðastýring. Samstundis gevur hon tykkum yvirlit yvir lógarásetingar og hjálpir at minka vandan fyri revsitiltøkum. Hetta styrkir tykkara trúvirði og ger tað lættari at samskifta um burðardygd – bæði innanhýsis og úteftir.
2. **Betran og sparing**: Ein góðkenning er ikki bara eitt prógv – tað er eisini eitt amboð til framhaldandi menning og raðfestingar til betraðar mannagongdir. Green Tourism-váttanin hevur t.d. víst, at fyritøkur við hesi góðkenning spara upp til 20% av orkukostnaði.
3. **Kappingarfyrimunur**: Ferðafólk og keyparar vilja hava álítandi burðardygd. Sambært Booking.com leggja 83% av ferðafólki dent á váttanir, tá tey velja ferðamál ella veitara. Ein góðkenning styrkir tykkara støðu á marknaðinum.

Visit Faroe Islands
Official Tourist Board of the Faroe Islands

# HVUSSU FARA VIT Í GONGD?

- Tit byrja við at meta um, hvørjum slagi av váttan hóskar til tykkara virksemi
- Velja ein standard ella skipan, t.d. Green Key, Svanan, ISO
- Seta ábyrgarfólk og td. ein arbeiðsbólk at fylgja burðardygdsarbeiðnum í fyritøkuni
- Finna innan- ella uttanhýsis hjálp at seta verkætlanina við burðardygdsgóðkenning í gongd
- Gera eina meting av verandi støðu
- Orða eina ítøkiliga ætlan fyri burðardygd
- Skjalprógva og samskifta innanhýsis og uttanhýsis um tykkara átøk, avbjóðingar og framstig

# TVEY SLØG AV ALTJÓÐA STANDARDUM

Vanliga eru tvey høvuðssløg av standardum innan burðardygds góðkenning:

1. Leiðslustandardar – t.d. ISO 20121* ella ISO 14001. Hesir vátta, at fyritøkan hevur eina skipaða og álítandi leiðsluskipan, sum tryggjar, at arbeiði við burðardygd er væl skipað, regluligt og miðvíst.
2. Framleiðslustandardar – leggja dent á úrslit: ávísir eginleikar ella krøv skulu røkkast og skjalprógvast fyri at fáa góðkenning.

*ISO 20121 fevnir um burðardygga tiltaksleiðslu (Sustainable Event Management System – SEMS).
**ISO 14001 fevnir um umhvørvisleiðsluskipan (Environmental Management System – EMS).

# ALTJÓÐA STANDARDAR OG GSTC

Global Sustainable Tourism Council (GSTC) hevur ment altjóða standardar – nevndir GSTC-kriteriini – fyri burðardygga ferðavinnu og ferðing. Kriteriini byggja á fýra høvuðsøki: umhvørvi, samfelag, mentan og leiðslu.

GSTC arbeiðir fyri at tryggja álítandi góðkenningar og váttanir við at:

- viðurkenna standardar, sum samsvara við teirra kriteriir – hesir fáa heitið “GSTC viðurkendir”
- góðkenna óheftar váttanarstovnar, sum kunnu vátta arbeiðið hjá fyritøkum og ferðamálum

Ein góðkendur váttanarstovnur skal brúka annaðhvørt GSTC-kriteriini ella ein ‘GSTC viðurkendan’ standard í váttanararbeiðinum. Hetta tryggjar, at góðkenningin byggir á altjóða viðurkenning og trygd.

# RÁÐGEVING OG STUÐUL

Tað eru fleiri ráðgevingarfeløg, sum kunnu hjálpa tykkum at fara í gongd við eina burðardygda góðkenning. Men tað eru ikki øll, sum hava góðkenning til at ráðgeva um ávísar váttanarskipanir.

Um tit vilja samstarva við einum ráðgeva, tryggið tykkum, at viðkomandi hevur royndir og/ella góðkenning innan júst ta skipan, tit vilja brúka – t.d. Green Key, Svanan, ISO ella B-Corp.

Vit viðmæla at venda sær til Visit Faroe Islands fyri vegleiðing. Har fáa tit innleiðandi ráðgeving og hjálp at finna rætta ráðgeva.

Til ber eisini at søkja um fíggjarligan stuðul til arbeiðstímar hjá ráðgeva, sum hjálpir tykkum við eini góðkenning.

# VIÐMÆLDAR BURÐARDYGDS GÓÐKENNINGAR

Á fylgjandi síðum er ein listi við burðardyggum góðkenningum, sum eru hóskandi fyri ferðavinnu og vinnuferðavinnu.

EARTHCHECK

EarthCheck er ein av leiðandi umhvørvisgóðkenningunum og samanberingarskipan fyri ferðavinnuna og verður brúkt í meiri enn 70 londum. EarthCheck grundað á vísund og gevur atgongd til ein hóp av stuðlandi amboðum og meiri enn 32 standardir. EarthCheck er GSTC góðkent fyri ferðamál.

Triðjaparts góðkenning.

Fyri ferðamál, hotellir, eventstøð og matstovur

GREEN DESTINATIONS

Green Destinations arbeiðri við meiri enn 200 ferðamálinum við bæði heiðursprísum og góðkenningum. Goðkenningin hevur fleiri enn 100 standardir og verður óheft vattað og GSTC góðkent fyri ferðamál.

Fyrsta parts og triðja parts góðkenning

Fyri ferðamál

Green Key

Green Key er ein góðkenning, sum fleiri enn 5000 hotel og aðrar ferðavinnufyritøkur hava í fleiri enn 60 londum. Tað er ein leiðandi altjóða góðkenning innan umhvørvisábyrgd og burðardyggar arbeiðsgongdir innan ferðavinnuna við einum sterkum grundvølli í Europa.

Fyrsta parts og triðja parts góðkenning

Fyri hotel, matstovur, eventstøð, incoming og ferðamál

Travelife Sustainability in tourism

Travelife góðkenningin er ein góðkenning, sum eftirmetir, prógvar og samskiftir burðardygg úrslit. Travelife  sameinir treytir og mannagongdir hjá GSTC, ISO14001, ISO26000 og GRI.

Fyrsta parts og triðja parts góðkenning

Fyri hotel og gistingarstøð, Incoming og ferðaskrivstovur

ISO

ISO 20121:2024 tilskilar krøv til eina burðardygga skipan fyri eventstýring fyri eitthvørt event ella eventviðkomandi virksemi ella felag.

Fyrsta parts og triðjaparts góðkenning.

Tiltaksfyriskiparar, Ferðamál, Incoming og PCO, eventstøð

Certified B Corporation

B Corp góðkenningin er ein leiðandi altjóða góðkenning, sum mátar, hvussu væl ein fyritøka megnar síni sosialu og umhvørvisligu avrik. B Corp mátar, hvussu virksemið og vinnumodell hevur árin á starvsfólk, samfelag, umhvørvi og kundar.

Fyrstaparts og triðjaparts góðkenning.

Allar fyritøkur

Nordic Swan Ecolabel

Nordic Swan Ecolabel er ein góðkenning úr Norðurlondum, sum fevnir um 55 vørubólkar, eisini íroknað ferðavinnu og vinnuferðavinnu og hevur høg umhvørviskrøv.

Triðja parts góðkenning

Fyri hotel og onnur gistingarstøð. Matstøð og eventstøð.